

www.oljan.fo

**Jan Müller** 20 - 03 - 2013

# Russiskur orkurisi til reiðar at bjarga Kýpros

Tað risastóra russiska orkufelagið Gazprom sigst hava givið myndugleikunum í Kýpros eitt tilboð um at bjarga bankunum har uttan at seta so strong krøv, sum ES og Altjóða Gjaldoyragrunnurin hava sett fyri at lata landinum ein bjargingarpakka. Tilboðið frá Gazprom er kortini ikki heilt treytaleyst. Sambært vælvitandi keldum vil russiska felagið hava rúmligar heimildir til at útvinna gass undan havbotninum við oynna afturfyri. Kanningar hava víst, at har er so nógv gass, at tað er virðismett til einar 100 milliardir evrur. Fianacial Times veit at siga, at Gazprom kom við tilboðnum, beint áðrenn kýpriski fíggjarmálaráðharrin var í Moskva fyrr í vikuni og tosaði við russiskar leiðarar og trupulleikarnar á oynni. Russar hava ovurhonds nógvar pengar standandi í bankum á Kýpros. Sambært týska tíðarritinum Der Spiegel fluttu russar umleið 80 milliardir dollarar ígjøgnum kýpriskar bankar í 2011, og tað ljóðar, at í løtuni hava russar umleið 26 milliardir dollarar í bankum har.

